## Vøllirnir hava skyldina

Wayne Rooney er seinasti spælarin í eini røð av spælarum, sum hava brotið eitt bein í fótinum, og nú skriva enskir fjølmiðlar um orsøkirnar til hetta. Onkur vil vera við, at tað eru teir nýggju og løttu gaggurnar, sum hava ein part av skyldini. Danny Murphy, miðvallari í Tottenham, heldur, at tað eru vøllirnir, sum eiga ein part av ábyrgdini.

– Vøllirnir verða røktir øðrvísi nú enn áður. Teir skulu vera fastir í tí, so at fótbóltsspælið kann verða so gott sum gjørligt, men føturnar hava tað ikki gott á hesum vøllum, tá ið nógvir dystir verða spældir eftir stuttari tíð, sigur Danny Murphy við The Sun.



## Todi er til reiðar

Føroyski álopsspælarin í Start, Todi Jónsson, er til reiðar at spæla dyst ímóti Fredrikstad í kvøld. Todi hevur verið plágaður av bæði skaðum og sjúku seinastu vikurnar, og um vikuskiftið spældi hann ikki við hjá Start. Nú er hann aftur klárur at tørna til, hóast hann hevur ein minni snudd í lærinum.

– Fyri ein gamlan mann sum meg, verður tað altíð okkurt smávegis galið, tá ið eg skal spæla mín fyrsta dyst í eitt hálvt ár, men eg eri klárur til dystin ímóti Fredrikstad, sigur Todi við Fedrelandsvennen.

# Nýtt ættarlið myndar føroyska landsliðið

**Óli Johannesen og Jákup Mikkelsen eru veteranar á landsliðnum, men Jógvan Martin Olsen er við at spæla eitt landslið saman við yngri spælarum. Fleiri nýggir mans fáa kjansin í dystinum ímóti Póllandi**

FÓTBÓLTUR
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Jógvan Martin Olsen hevur nú sett navn á spælararnar, sum skulu verða við føroyska a-landsliðnum í venjingardystinum ímóti Póllandi tann 14. mai.

Nú eru alsamt færri spælarar eftir, sum hava spælt fleiri enn 25 landsdystir, og fleiri kunnu spæla sín fyrsta altjóða landsdyst í Póllandi.

Bjarni Jørgensen, sum spælir við Skála, er millum teir 18 spælararnar, sum eru tiknir út til landslið. Bjarni hevur spælt nógv á ungdómslandsliðum, men nú skal hann við til fyrsta veruliga a-landsdystin.

Hans Pauli Samuelsen úr EB/Streymi og Christian Restorff Mouritsen úr Manchester City eru eisini tiknir út hesaferð, og teir eru báðir spildurnýggir á landsliðnum.

Afturat teimum eru eisini fleiri aðrir spælarar, sum eru feskir á landsliðnum - Hanus Thorleifsson úr B36, Janus M. Joensen úr HB og Rasmus Nolsøe úr HB.

### Færri við royndum

Jákup Mikkelsen og Óli Johannesen eru teir, sum fram um allar hinar, hava royndir frá altjóða fótbólti. Teir verða framvegis stuðulsspælarar í næstu undankappingini hjá landsliðnum.

Jákup Mikkelsen er so sjálvskrivaður til landsliðið, at bert hann er tikin út sum málmaður hesaferð. Jens Martin Knudsen er við landsliðnum sum málmansvenjari, og tað ger møguliga, at landsliðsvenjarin torir at satsa á hendan hátt, og harvið fáa pláss fyri fleiri útispælarum, sum hann vil royna.

Eftir Jákup og Óli eru tað yngri spælarar, sum hava verið fastir menn seinnu árini, men tað eru færri av teimum. Jákup á Borg, Fróði Benjaminsen, Súni Olsen og Jón Rói Jacobsen mugu roknast sum stuðulsspælarar, men nógvir av teimum, sum eru tiknir út hesaferð, hava ikki spælt fast við landsliðnum.



*Bjarni Jørgensen hjá Skála er nýggjur maður á a-landsliðnum. Hann verður við í dystinum ímóti Póllandi um 10 dagar*

### Fleiri mangla

Onkrir av teimum, sum hava verið nógv við seinnu árini, ella sum tað verður roknað við frameftir, eru ikki við í dystinum ímóti Póllandi. Andrew av Fløtum, Mortan úr Hørg, Símun Samuelsen, Pauli G. Hansen, Claus Bech Jørgensen, Rógvi Jacobsen, Ingi Højsted og Heðin á Lakjuni eru ikki tiknir út.

Fleiri av hesum eru darvaðir av skaða ella eru bundnir av dysti fyri útlendsku feløg síni.

Hetta gevur so kjansin til aðrar spælarar, sum Jógvan Martin væntar sær nakað av í framtíðini.

### FAKTA

Jógvan Martin Olsen hevur tikið hesar 18 spælarar út til landsdystin ímóti Póllandi 14. mai

Jákup Mikkelsen, B36
Fróði Benjaminsen, B36
Hanus Thorleifsson, B36
Christian Høgni Jacobsen, NSÍ
Janus M. Joensen, HB
Rasmus Nolsøe, HB
Kári Nielsen, HB
Jákup á Borg, HB
Atli Danielsen, KÍ
Hjalgrím Elttør, KÍ
Óli Johannesen, TB
Jónhard Frederiksberg, Skála
Bjarni Jørgensen, Skála
Hans Pauli Samuelsen, EB/Streymur
Jan Ingi Petersen, B68
Jón Rói Jacobsen, AaB
Súni Olsen, AaB
Christian R. Mouritsen, Manchester City

## FINNIÐ BÓLTIN

Saman við Atlantic Airways lutar Sosialurin í ár ikki færri enn 13 flogferðaseðlar á rutunetinum hjá Atlantic. Ein vinnari verður hvørt umfarið í Formula-deildini

Møguleikarnir fyri flogferðum úr Føroyum hava ongan tíð verið so stórir, sum teir verða tað í ár. Við fimm flogførum í støðugari flúgving eigur Atlantic Airways sín stóra lut í øktu valmøguleikunum, og nú kanst tú saman við Sosialinum og Atlantic verða partur í nøkrum av mongu fráferðunum.

Eftir hvørt umfarið í Formula-deildini verður ein mynd at síggja her í blaðnum, har vit hava »sletta« bóltin úr myndini. Uppgávan hjá lesaranum er so at gita, hvar hesin bólturin eigur at vera.

Við at senda SMS-boð á 1441 ber til hjá lesarunum at vera við í kappingini, har Atlantic Airways hevur eina flogferð tøka eftir annaðhvørt av teimum 27 umførunum í Formula-deildini.

Heldur tú, at bólturin er í teigi 1, skal teksturin í SMS-boðnum vera »hvar 1«. Soleiðis skal hvørt boðið bara innihalda orðið »hvar« og so nummarið á teiginum, har tú heldur bólturin eigur at vera.

*Kostnaðurin fyri at senda boðini er 5 krónur umframt vanligan SMS-takst.*



ATLANTIC AIRWAYS




**Hvar er bólturin?**
Hvar heldur tú, at bólturin er? Við at senda eini SMS-boð til 1441 kanst tú vera við í lutakastinum um eina ferð á rutunetinum hjá Atlantic Airways. Skrivað hvar og so nummarið á teiginum, har tú heldur bóltin vera.